# TÍÐINDI

SAMBAND
KÁRI MIKKELSEN
POST@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Sett kós á veðurlagsøkinum



**Løgmaður og landsstýrisfólkini Jørgen Niclasen, Jóannes Eidesgaard og Annika Olsen høvdu í gjár fund um føroysku virkisætlanina á veðurlagsøkinum**

POLITIKKUR
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Á skránni vóru arbeiðstilgongd og skipan í sambandi við veðurlags- og umhvørvisátøk og luttøka á veðurlagsráðstevnuni í Keypmannahavn, COP15, sum verður 7. til 18. desember í ár.

Løgmansskrivstovan sigur, at landsstýrið er samt um, at andstøðan, vinnan og aðrir áhugabólkar eiga at taka lut í tilgongdini. Ætlanin er at skipa ein politiskan fylgjubólk við framsøgufólkum úr øllum flokkunum og ein COP15 fylgjubólk við umboðum úr vinnuni, granskingarumhvørvinum og øðrum áhugabólkum. Ætlanin er, at bólkarnir skulu verða mannaðir í næstu viku.

Ein verkætlanarbólkur við umboðum úr Uttanríkisráðnum og Løgmansskrivstovuni fyrireikar í løtuni føroysku luttøkuna á COP15 og kannar, hvørjar møguleikar Føroyar hava at gerast partur av altjóða sáttmálum um niðurskurð í útláti av veðurlagsgassum.

Í desember lat verkætlanbólkurin undir Innlendismálaráðnum frágreiðingina »Skjótt syftir seiðir og tunga takið«, ið lýsir uppskot til virkisætlan og tiltøk at minka um føroyska CO2-útlátið. Frágreiðingin verður í løtuni viðgjørd í teimum einstøku aðalráðunum og um miðjan mars skulu landsstýrisfólkini koma við einari greining av, hvørji tiltøk kunnu setast í verk innan teirra málsøki, sigur løgmansskrivstovan.



*Rói Ørvarodd, stjóri hjá Skousen á Hálsi í Havn hevur góðar vónir, nú tey tvíflada haldilshølini*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

## Tvífalt pláss til hvítvørur

**Meðan fleiri handlar og virki repa seglini, so hava tey í handlinum hjá Skousen á Hálsi í Havn valt tað øvugta: Tey hava tvífaldað handilshølini**

HANDILSLÍV
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Hvítvøruhandilin Skousen á Hálsi í Havn víðkar nú um handilshølini. Handilin hevur seinastu trý árini havt til húsa í gamla bygninginum hjá P/F Jákupi á Dul í einum hølum, sum eru um 200 fermetrar. Men nú verður handilin tvífalt so stórur, tí nú verða hølini, har Biga Køkar vóru tikin við í handilin hjá Skousen.

- Vit hava ikki merkt nakað til afturgongdina, sum øll tosa um, og tá hesi hølini nú vóru tøk, so nýttu vit høvið at vaksa um handilin, sigur Rói Ørvarodd, stjóri í Skousen.

Hóast navnið er danskt, so er talan um ein føroyskan handil, sum verður rikin við eini franchising-avtalu. Skousen hava 75 slíkar franchising-handlar. Ein franchisingavtala merkir, at tú keypir tær rættin til konseptið, eins og vit t. d. kenna tað frá Burger King, Shell o. s. fr.

- Tað eru hvítvørur, sum eru okkara spesiali, serliga eru tað vaskimaskinur, køliskáp o. s. fr. men vit hava allar hvítvørur, eisini eitt nú kaffimaskinur og rakimaskinur, sigur Rói Ørvarodd, sum kortini leggur afturat, at tey halda seg burtur frá sjónvarpi og útvarpi.

Trý fólk starvast fulla tíð hjá Skousen – og tá á stendur hava tey nøkur fólk afturat at heita á.

Tá latið verður upp í nýggja handlinum mánamorgunin, verða serlig forkunnug tilboð.

- So tað verður bíligt at keypa hvítvørur næsta mánaðin, sigur Rói Ørvarodd.



# Granskarar til Fiskimálaráðið

**Fiskimálaráðið søkir eftir tveimum granskingarleiðarum og einum búskapargranskara til komandi granskingarverkætlanir hjá Fiskivinnugransking.**

***Les meira á www.fvg.fo***

Fiskimálaráðið FISKIVINNU GRANSKING